| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 24. januar 2013 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2013 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2013 tann 24. januar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 17. januar 2013 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2013.**

**Broytan av "Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu".**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 13. januar 2013 til broytan av "Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu, sum góðkend varð av býráðnum tann 03. september 2001 við seinni broytingum.

Sambært uppskotinum eru broytingar tillagaðar eitt nú broyttu roknskaparreglunum so vítt gjørligt, eins og broytingar eru gjørdar fyri føstu nevndirnar, eins og havnanevndin er broytt til vinnunevnd.

Eisini eru broytingar gjørdar fyri brunanevndina, sum broytt er til tinbúgvingarráðið, eins og fyri hellunevndina.

Eisini eru aðrar broytingar framdar, og verða hesar vístar í reyðum liti í mun til galdandi kommunustýrisskipan.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið frá fyrisitingini á fundi 15. januar 2013 og gjørdi á fundinum nakrar broytingar. Nevndin mælir býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til broytingar av "Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu".

Vísandi til § 35 í skipanini, so skulu broytingar í hesi verða viðgjørdar á tveimum býráðsfundum við í minsta lagi 14 daga millumbili.

**Avgerð:**
Samtykt var at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundi 28. februar 2013, við teirri broyting, at borgarstjórin sambært § 29 ikki kann verða formaður í Hellunevndini. (9-0).

**Mál nr. 02/2013.**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2012***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá fyrisitingini, dagfest 14. januar 2013 saman við uppskoti til roknskap fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2012. Grannskoðaður roknskapur frá "Januar – løggilt grannskoðaravirki" saman við grannskoðarafrágreiðing fyri bókasavnið kemur seinni í vikuni og verður sent býráðnum saman við nevndartilmælinum.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 785.061,19** móti mettum kr. 747.500,00. Sostatt eru kr. 37.561,19 meira nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 2.934,70 lægri enn mett, so nú er samsvar vorðið millum avseting og nýtslu. Býráðið setti tann 01. mai 2011 nýggjan bókavørð við útbúgving í starv, og at lønin hjá hesum er væl hægri flokkað enn fyribilsstarv hjá bókavørði uttan útbúgving, og tí varð avsetingin fyri 2011 alt ov lág. Hetta er nú komið í rættlag.

Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 7.783,77 hægri enn mett, eitt nú grundað á at ljós og hiti hevur havt eina meirútreiðslu upp á kr. 21.826,25, meting kr. 40.000,00 brúkt kr. 61.826,25. Tó er minni nýtsla upp á kr. 14.042,48 fyri umvælingar, skattir og tryggingar og reingerð. Mett kr. 19.500,00 brúkt kr. 5.457,52. útreiðslur til bókakeyp og innbinding hava verið kr. 7.351,27 lægri enn mett, við tað at metinin varð kr. 127.000,00, meðan staðfesta nýtslan hevur verið kr. 119.648,73.

Aðrar útreiðslur hava verið kr. 39.458,39 hægri enn mett. Hækkingin stavar frá meirútreiðslum í sambandi við telefon, umsiting/leiga av maskinum, EVD útreiðslur og nýútveganum av teldum/innbúgvi. Avsettar vórðu kr. 101.000,00 í fíggjarætlanini, meðan nýtslan hevur verið kr. 140.458,39.

Inntøkurnar hava verið kr. 179.351,00 í landskassastuðli móti mettum kr. 299.000,00, t.v.s. kr. 119.649,00 minni enn mett, og hevur kommunan sostatt borðið restina av kostnaðinum – inntøkur upp á kr. 6.130,00 ella 599.579,79.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstrarætlan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstrarætlanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2011 er grundaður á rakstrarætlanina fyri 2012. Sambært rakstrarætlanina fyri 2012 varð roknað við einum kostnaði upp á kr. 747.500,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi landskassastuðulin verið kr. 299.000,00, men sambært skrivi frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum hetta skuldi givið kommununi kr. 192.000,00, men eru játtanin eftir hetta lækkað niðan í kr. 179.351,00 ella við kr. 12.649,00.

Roknskapurin 2012 vísir, at kr. 119.649,00 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%, so er býtið 60>40% er ikki í lagi. Sambært roknskapinum er hetta 76>24%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 14. januar 2013, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2012 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini um at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2012 varð samtykt uttan viðmerkingar. (9-0).

**<u>Mál nr. 03/2013.</u>**

**Ætlanarskriv viðvíkjandi SP/F Tannlæknastovuni hjá Steintór Larsen.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið ætlanarskriv frá Jan Otto S. Holm, dagfest 26. november 2012 í sambandi við samskifti millum kommununa og SP/F Tannlæknastovuna hjá Steintóri Larsen, seinastu árini.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 19. desember 2012 viðgjørt ætlanarskrivið og tók nevndin á fundinum avgerð um at góðkenna uppskotið til ætlanarskriv uttan viðmerkingar.

Tó verður neyðugt at leggja málið fyri komandi býráðsfund, sum hildin verður 24. januar 2013 til endaliga góðkenning, áðrenn avtalan endaliga verður undirskivað partanna millum.

Í skrivinum verður í stuttum greitt frá virkseminum á tannlæknastovuni, støðuni ídag, aðalendamálinum og loysnir fyri at tryggja, at virksemið á tannlæknastobvuni ikki heldur uppat, sí niðanfyri:

*Fyri at tryggja, at virksemi á tannlæknastovuni ikki steðgar, og at henda tænastan til børnini og borgarar í kommununi ikki hvørvur, so eru partarnir samdir um at arbeiða miðvíst fram ímóti, at annar kann yvirtaka leiðsluna og ábyrgdina av tannlæknastovuni. Fuglafjarðar kommuna er sinnað og ynskir at hava virknan leiklut í hesum.*

Fuglafjarðar kommuna og Steintór Larsen (ella umboð fyri Steintór Larsen) fara tí beinanvegin at arbeiða virkið fyri, at aðalendamálið nevnt omanfyri verður trygggjað, og at hetta verður gjørt í stigum.

Partarnir eru tí samdir um og vilja virka fyri, at:
**Stig 1.**
Tannlæknastovan (niðara hædd av sethúsunum á Torkilskróki 8) verður avhendað til antin:
- Ein tannlækna, ið er sinnaður at yvirtaka tannlæknastovuna
- ella Fuglafjarðar kommunu, um slíkur tannlækni ikki verður funnin innan 1 ár.

**Stig 2**
Arbeitt verður eisini miðvíst fram ímóti, at ovara hædd av húsunum verður yvirtikin av antin:
- Einum tannlækna, ið til dømis ynskir at seta búgv í sethúsunum
- ella Fuglafjarðar kommunu, um tannlækni, ið er áhugaður í hesum, ikki er funnin innan 1 ár.

Nærri verður avtalað, hvussu yvirtøkan av húsunum kann fara fram, og at hetta verður gjørt í samráð við eigararnar av sethúsunum á Torkilskróki 8.

Viðvíkjandi stigi 2, so hevur á fundum partanna millum seinastu árini verið tosað um, at ovara hæddin á umleið 180 m2 og niðara hæddin, sum er tannlæknastovan við 180 m2, kunnu verða frámatrikulerað.

Á henda hátt kann ovara hæddin verða nýtt til eitt nú læknaíbúð, læknaviðtaluhøli ella íbúð til tann læknan, sum ynskir at yvirtaka tannlæknastovuna ella verða settur í starv av kommununi. Av tí at bæði ovara og niðara hædd eru atkomiligar við koyristóli, so er eisini møguligt at gera eitt nú vardar íbúðir.

Upplýsast skal, at kommunan hevur fulla ábyrgd av, at børn í undirvísingarskyldugum aldri (6-15 ár), sum skrásett eru í kommununi, fáa ókeypis tannrøkt, hetta vísandi til § 1 í "Kongelig anordning nr. 454" við gildiskomu fyri Føroyar um "Lov om børnetandpleje", sum broytt er við løgtingslóg nr. 29 frá 26. mars 1997.

Tó hevur býráðið í 1994 tikið avgerð um, at skipain varð broytt, soleiðis, at henda eisini kemur at umfara øll børn millum ½ og 15 ár, og hevur henda skipan verið galdandi fram til dags dato.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um góðkenning av ætlanarskrivinum við teirri viðmerking, at skrivið, sum undirskrivað verður av kommununi, ikki kemur at binda kommuna við at keypa ognina á matr. nr. 143aæ á Torkilskróki 8 í Fuglafirði frá Steintóri Larsen. (9-0).

**<u>Mál nr. 04/2013.</u>**

**Viðvíkjandi rúsevnispolitikki.**

Tekniska nevndin hevur á fundi tann 15. januar 2013 viðgjørt spurningin um rúsevnispolitikk kommununar og mælir einmælt býráðnum til, at rúsevnispolitikkur landsins verður settur í gildi fyri Fuglafjarðar kommunu.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini um at seta rúsevnapolitikkin í gildi fyri Fuglafjarðar kommunu. (9-0).

**<u>Mál nr. 05/2013.</u>**

**Fráboðan um eykaaðalfund í SEV.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá elfelagnum SEV, dagfest 16. januar 2013, har boðað verður til eykaaðalfundar fríggjadagin 15. februar 2013 kl. 10.00 á Hotel Føroyum við niðanfyri standandi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra, jbr. § 3, stk. 4 í viðtøkunum.
2. Val av nevnd sambært §4, stk. 2 og 3 í viðtøkunum
3. Ymiskt.

Hjálagt er yvirlit yvir atkvøðutak til aðalfundin við støði í fólkatalinum pr. 30. september 2012 og hevur kommunan sambært hesum 2 atkvøður. Vísandi til §3, stk. 3 í viðtøkunum er hjáløgd fulltrúarváttan, sum kommunan verður biðin um at lata inn til høvuðsskrivstovuna, og skal í hesi verða tilskilað, hvør persónurin er, sum umboðar kommununa og hevur møti-, talu- og atkvøðurætt.

Haraftrat er hjálagdur tilmeldingarlisti, sum kommunan eisini verður biðin um at lata inn til høvuðsskrivstovu felagsins, og á hesum lista skal verða tilskilað, hvørjir kommunustýrislimir møta á aðalfundinum, umframt umboðið, sum hevur fulltrúarváttanina.

Nevndin fyri SEV hevur áður mælt til, at praksis verður, at kommunustýrislimir, sum ikki eru umboð, hava møti- og talurætt.

Vísandi til skipanina av nýggja býráðnum tann 10. desember 2012, so er atkvøðurætturin hjá borgarstjóranum, meðan tað stendur øllum býráðslimum frítt at møta á aðal- og eykaaðalfundum hjá SEV við møti- og talurætti.

**Avgerð:**
Málið um innkallingina til eykaaðalfundin í SEV varð umrøtt á fundinum, serliga við atliti til punkt 2 á dakskránni um val av nevnd sambært §4, stk. 2 og 3 í viðtøkunum fyri SEV. Borgarstjórin upplýsti, at hann ídag hevði tosað við Jóhan Christiansen, borgarstjóra fyri Eysturkommunu um viðurskifti í

sambandi við vali av stýrislimi í nevndina fyri SEV fyri Eysturoynna. Hesin upplýsti, at Runavíkar-Eystur- og Nes kommunur beint eftir kommunuvalið høvdu gjørt sínámillum avtalu um, at Runavíkar kommuna kom at fáa nevndarlimin í stýrið fyri SEV, meðan Eysturkommuna kom at fáa nevndarlimin í IRF umboðandi Eysturoynna.

Henda avtala partann millum er gjørd, uttan at Fuglafjarðar kommuna á nakran hátt hevur fingið fundarboð um viðurskiftini, eins og gjørt hevur verið eftir undanfarin kommunuval, tá ið nevndirnar skulu verða mannaðar.

Býráðið er sera ónøgt við mannagongdina og varð samt um at taka spurningin upp á eykaaðalfundinum í SEV 15. februar 2013, eins og málið eisini veriður reist yvir fyri Kommunusamskipan Føroya, um at fáa viðgjørt mannagongdir í sambandi við val nevndarlimum, eitt nú í SEV og IRF.

Býráðið verður á eykaaðalfundinum umboðað av Sonna á Horni, borgarstjóra við atkvøðufulltrú, meðan býráðið annars verður umboðað av: Sigurði S. Simonsen, Dánjali Vang, Árant Bejastein, Siggu Óladóttir Joensen, Magnusi S. Midjord og Birgiri Petersen.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.10.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen